Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Árni Skaale, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Alment innlit í tilmælini hjá umsitingini um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir

Spurningar:

> Ætlar landsstýrismaðurin at lata alment innlit ella partsinnlit í tilmælini frá umsitingini um at játta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir – herundir til ítøkiligt skipakeyp og ískoytiskvotur í 2020 og 2021 – og skrivliga og skjalfesta grundarlagið hjá landsstýrismanninum fyri at vraka tilmælini og velja onnur ístaðin?

Viðmerkingar:
Fráfarni landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skrivliga og munnliga svarað, at hann í fleiri førum vrakaði tilmælini frá síni umsiting um játtanir til ískoytiskvotur, vinnuligar royndir og verkætlanir – harundir til ítøkiligt skipakeyp – og valdi aðrar ístaðin. Hetta hendi bæði í 2020 og í 2021.

Kortini hevur Fiskimálaráðið hevur noktað alment innlit í, hvørji tilmælini og avgerðargrundarlagið hjá umsitingini vóru, og hvørjar lógligar og sakligar grundgevingar eru skjalfestar í málunum fyri at vraka hesi tilmæli og seta onnur ístaðin.

Spyrjaranum kunnugt, hava heldur ikki umsøkjarar fingið partsinnlit ella partshoyring um hesar fyrsitingarligu metingar, grundgevingar og avgerðir, ið snúgva seg um trýsiffraðar miliónaupphæddir í virði.

Tí verður nýsetti landsstýrismaðurin biðin um at upplýsa og svara umsøkjarum, almenninginum og Løgtinginum um hesi spurdur, hvørt hann heldur at, at alment innlit ella partsinnlit skal latast sambært fyrisitingarlógini og lóg um alment innlit í fyrisitingina.

Á Løgtingi, 24. januar 2022

Høgni Hoydal